# Samstarv um vernd av børnum

**Fríggjadagin skrivaðu formenninir í Føroya Kommunufelag og Kommunusamskipan Føroya undir avtalu um samstarv í samband við barnaverndarmál**

BARNAVERND
*Snorri Brend*



*Rósa Samuelsen, formaður í Kommunufelagnum (hm.) og Rodmundur Nielsen, formaður í Kommunusamskipanini undirskriva avtaluna um barnaverndarstovu á kommunuskrivstovuni í Sandavági*

**Sandavágur:** Barnavernd er fyrsta stórmálið, sum lagt er út til kommunur at umsita. Nú fara so kommunurnar í samstarvi undir hesa umsiting.

Rósa Samuelsen, formaður í Kommunufelagnum og Rodmundur Nielsen, formaður í Kommunusamskipanini undirskrivaðu avtaluna á kommunuskrivstovuni í Sandavági.

Báðir felagsskapirnir eru í avtaluni vorðnir samdir um at skipast skal ein felags barnaverndarstova, sum skal hava ábyrgd av økinum.

- Hetta er mál, sum vit eru púra samd um, sigur Rodmundur Nielsen. Tað er stutt og greitt ikki pláss fyri ósemjum í slíkum álvarsmáli.

Eitt av stórmálunum hjá barnaverndarstovuni verður at umsita fosturforeldraskipanina.

Setast skal ein leiðari við viðkomandi fakligari útbúgving, og væntandi verða eisini eitt til tvey fólk sett afturat.

Sjálv lógin um barnavernd kemur í gildi á nýggjárinum. Men kommunurnar hava valt at seta barnaverndarstovuna á stovn nú, soleiðis at starvsfólkið kann vera væl fyrireikað at fara undir uppgávuna, tá hon av álvara verður løgd út til kommunurnar til umsiting.





**Shell** søkir eftir nýggjum hitatænastumanni í Suðuroy.
Hitatænastan hjá Føroya Shell umfatar árligt eftirlit, sum inniber reinsan av oljufýri og ketli, kannan og stillan av oljufýri, harumframt verður eisini skorsteinsgjóstur kannaður.
At oljufýrið er stillað rætt verður tryggjað við eftirlitsmátingum. Eisini umfatar hitatænastan hjá **Shell** at farið verður út til kundar, sum hava stopp og aðrar trupulleikar við oljufýringini.

Vit ynskja ein persón sum er:
✔ Ágrýtin
✔ Tænastusinnaður
✔ Fleksibul
✔ Samstarvssinnaður
✔ Álítandi
✔ Jaligur og opin
✔ Røkin
✔ Hevur góðan fakligan førleika

Í sambandi við starvið verður neyðugt við skeiði/útbúgving í Danmark.

Løn sambært avtalu.

Áhugað kunnu venda sær til Thomas Thomsen 372711 ella til Erling í Liða, sølu- og marknaðarleiðari, 347400

Umsóknirnar verða viðgjørdar í trúnaði og skulu í seinasta lagi 15. juni 2005 sendast til

Føroya Shell í Suðuroy
800 Tvøroyri
att.: Thomas Thomsen

www.shell.fo

www.fonnflog.fo



# Kom við til Formel 1

22.–25. juli

**Prísur** Pr. pers. í dupult ella twin rúmi

**kr. 6.410**

*Spenningur, ferð, bensin-os og flottir bilar*

– 22. juli kl. 08:15 flúgva úr Vágunum
– Kl. 14:00 koyra við 5***** Royal Class bussi úr Kastrup til Týsklands
– Tíðliga leygarmorgun – koma til Hockenheim
– Eta morgunmat og verða koyrd til bánan
– Hava silvurpass til báðar dagarnar – føst sitipláss á »tribunu«
– Umleið kl. 17:00 verða koyrd til Hotel Berg 3***
– Gista í twin og dupult rúmum
– Bussurin fer kl. 07:00 sunnumorgunin frá hotellinum til Hockenheimbánan
– Bussurin koyrir umleið kl. 17:00 til Danmarkar
– Koma til Keypmannahavnar umleið kl. 09:00 mánamorgunin
– Flúgva úr Kastrup kl. 20:45 til Føroya 25. juli

**Hotellið:** eitur Hotel Berg og liggur 30 min. frá bánanum. Tað er trýstjørnað og hevur barr og matstovu. Vit gista í twin og dupult rúmum við wc/bað, satelitt-sjónvarpi, radio og minibar.

**Bussurin:** Vit koyra í Royal Class bussi, sum hevur gott pláss til beinini, eyka vipp í rygginum og eina pútu at koyra undir beinini, tá ið setrið er í hvílustøðu. Har er sjónvarp, video, radio/cd, wc, køkur við køliskápi, kaffimaskinu og mikro-ovni, air condition o.a.

**Transport:** Allur transportur er við í pakkanum:
– frá Kastrup til Týsklands
– millum bánan og hotellið báðar dagarnar
– frá bánanum til Kastrup

*Ringið til Fonn Flog 456363 og hoyrið nærri um ferðina!*
*Avmarkað pláss!*

FONN FLOG

FO-700 Klaksvík Tel 456363 · FO-600 Saltangará Tel 474800
fonnflog@fonnflog.fo · www.fonnflog.fo